## Umbering til Ólav Petersen í Sørvági

Á síðu 11 í blaðnum leygardagin stendur ein grein hjá Ólavi Petersen, nevnd »Føroyingar á altjóða svartalista«. Saman við greinini er mynd av Ólavi Petersen í Sørvági. Her er komið bland í, tí tað er ikki Ólavur Petersen í Sørvági, sum skrivað hevur. Vit biða hann umbera okkum mistakið.

**Blaðstjórin**

# Tilhaldið fýra ár



*Í dag eru liðin fýra ár síðani, at Tilhaldið í Havn varð sett á stovn. Tilhaldið hevur til húsa í teimum hugnaligu, gomlu Føroya Bankahúsunum í Tórsgøtu*

TÍÐINDASKRIV

í dag, 12. mars, verður Tilhaldið í Tórsgøtu í Havn fýra ár. Í hesum sambandi verður skipað fyri føðingardegi í dag klokkan 15, tá Jákup Lindenskov leggur fyri. Sangbólkurin í Tilhaldinum fer at syngja, og Petra J. Joensen, almannastjóri, fer at siga nøkur orð.

Kl 16 verður »Speaker corner«, og drekka og lagkøka verða at fáa.




†

Okkara kæri lítli skattur

**Hanna Niclasen**

sovnaði frá okkum tann 19.2. 2002,
bert tveir dagar gomul.

En Liten Engel
Til Oss Kom
Smilte blidt
Og Vendte Om

Jarðarferðin varð hildin
frá Båtsfjord kirkju tann 1.3.

**Norman, Kathrine og Andreas**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Haldor Sigurðsson**
Klaksvík

andaðist leygarmorgunin, 81 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 18.30 heim í Betesda.

Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13.00 úr Betesda.

**Eyð, Ann og Siw**



